# Íslendskur trubadurur á G!

**Íslendski trubadururin Pétur Ben er enn eitt útlendskt navn á ársins G! festivali. Hóast hann ikki er millum best kendu nøvn í Føroyum, luttók hann eisini á G! í fjør.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hansara egni singer/songwritersligi fólkarokkur er longu fagnaður heima í Íslandi og vinnur alsamt meira fram í útlondum, og nú stendur Føroyar á skránni.

Í Íslandi er Pétur Ben Benediktsson heimskendur. Hann hevur lagt til rættis løg fyri Slowbrow, Telepathics, Mugison og mangar aðrar íslendskar bólkar og einstaklingar.

Føroyingar minnast hann kanska sum gittarleikara hjá Mugison.

Pétur Ben hevur gjørt tónleik til filmar og sjónleikir

Evnini at leggja til rættis og kærleikin til leiklistina runnu saman, tá ið Pétur Ben herfyri fekk møguleikan at leggja til rættis tónleikin hjá Tom Waits til víðagitna leikin "Woyzeck" hjá Büchner.

Í fjør kom fyrsta útgávan hjá Pétur Ben, sum einstaklingi "Wine For My Weakness". . Á útgávuni flytir hann seg víða og roynir síni kynstur í mongum ymiskum tónlistarligum samanhangum, við mongum ymiskum ljóðførum. Hann sýgur lurtaran inn í sín egna lítla og sera spennandi heim, har alt kensluspektrið fær fríar ræsur, og har øll kynstur eru loyvd í ævigu leitanini eftir fullkomna og besta hátinum at úttrykkja júst hesar kenslur. Fyrst ljóðar "Wine For My Weakness" sum rættiliga klassiskur singur/songwriter tónleikur, men skjótt gerst greitt, at her er eitt dýpi undir, skrivar G! millum annað í tíðindaskrivi.

Við sær á G! hevur Pétur Ben legendariska Sugarcubestrummuleikaran Sigtryggur Baldursson

Vitjað Pétur Ben á myspace.com/peturben



# Eyðun Nólsøe frumframførir í Føroyahúsinum.



*Eyðun Nolsøe fer at frumframføra nýggju fløguna í Føroyahúsinum í Keypmannahavn*
*Mynd: J.A. á Brúnni*

**Eyðun Nolsøe byrjar sína útgávukonsertferð leygarkvøldið í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, sambært Hans Petur í Brekkunum, leiðara gongur forsølan væl.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í Føroyahúsinum gera tey sera nógv burturúr hesum kvøldinum. Stórt ljóð og ljósannlegg verður leigað til tiltakið, og leiðarin lovar at hetta kvøldið verður nakað heilt seligt.

"So nógvar røddir", er heitið á nýggju fløguni hjá hjá Eyðun Nólsøe, og at Eyðun hevur valt Føroyahúsið til fyrsta staðið har livandi tónarnir frá hesi fløguni verða framførdir boðar frá nýggjum og spennandi tíðum í Føroyahúsinum.

Konsertin, ið byrjar kl. 21.00 er ein sitikonsert, og Høgni Lisberg hitar upp. Høgni hevur fingið sera nógvan undanvind í Danmark seinasta hálva árið, og hevur á biografkonsertum og Atlantic Music Event í Reykjavík og Føroyum víst, at hann er í toppformi.

Eftir konsertina verður dansur har Eyðun Nólsøe Band spælir.

Atgongumerki kunnu keypast í forsølu í Føroyahúsinum. Avmarkað atgongd er til konsertina, ið byrjar kl.21.00.

## Maskinstjóri

Søkt verður eftir maskinstjóra til verksmiðjutrolara, til fiskiskap í Stillahavinum.
Skipini eru bygd í 1991-1993, eru 105 metrar til longdar og 20 metrar breið.

Høvuðsmaskina 6000 kW Wartsila.

Brattvaag trolspøl, MWM Deutz hjálpimotorar, York/Sabroe frystiútgerð.

Fyrispurningar og umsóknir verða at senda til Jan Erik Simonsen, tekniskur deildarleiðari á t-post: janerik@thor.fo

**P/F Thor Fisheries**
Bryggjan 5
Hósvík

Thor Fisheries er dótturfelag hjá P/F Thor í Hósvík. Dótturfelagið varð stovnað í januar 2007, og rekur tvey verksmiðjuskip, ið fiska í sunnara parti av Stillahavinum. Tað eru 260 fólk í starvi hjá Thor Fisheries.

ÚTBJÓÐING

## Norðskálatunnilin – ljós, luftskiftisskipan og trygdarútbúnaður

Við hesum verður boðið út alment í høvuðsarbeiðstøku, at uppseta ljós, luftskiftisskipan og trygdarútbúnað í Norðskálatunnilin.

Tunnilin er 2516 m langur. Higartil eru gjørdar allar tekniskar innleggingar í vegnum og teknik- og háspenningsrúm er gjørt inni í tunnlinum umframt at kaðalbakkar eru upphongdir.

Komandi arbeiðið skal gerast sambært handbók 021 frá norska vegaverkinum og fevnir um at:
- uppseta og íbinda ljós gjøgnum tunnilin
- uppseta frávíkjandi ljós í 5 skaðainnvikum
- uppseta og íbinda 20 ventilatorar
- uppseta og íbinda 7 neyðstøðir við telefon og eldsløkkjara
- uppseta aðrar 5 eldsløkkjarar

Væntast kann, at neyðugt verður at arbeiða um náttina og at ferðsla skal leiðast gjøgnum tunnilin kl. 24, 02 og 04.

Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagið 30. juni 2008.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, FO-100 Tórshavn, **hósdagin 24. mai 2007, kl. 10.00.**

Ástaðarfundur verður **mikudagin 16. mai 2007, kl. 10.00.**

Møtt verður við tunnilsmunnan Norðskálamegin.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá **hósdegi 26. apríl 2007**, við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
Fo-110 Tórshavn
Telefon: 340 800

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað móti einum veghaldi til støddar kr. 2.000, ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Eik. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir listiatiónina, t.e. 31. mai 2007.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur og flogvallamál.*

*Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*